SKURÐ DEPIL

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Hjartaskurðviðgerð



Flestu skurðviðgerðir, ið eru gjørdar í hjartanum, eru hjartalokuskurðviðgerðir og ”bypass-skurðviðgerðir”. Í einari skurðviðgerð í hjartalokunum, verða hjartalokurnar antin endurnýggjaðar ella viðgjørdar. Í einari skurðviðgerð í krúnuæðrunum verða æðrar tiknar úr beininum og knýttar til krúnuæðrarnar. Eftir eina skurðviðgerð í krúnuæðrunum er ein skurður í legginum á beininum og ein skurður í bringuni.

Fyrireiking til skurðviðgerð er umráðandi. Mælt verður til at verða úthvíld/ur undan skurðviðgerðini. At verða úti í frískari luft og at røra seg javnan ger góðan mun til fyrireikingina. Hetta minkar um strongd og ger, at tú kennir teg betri áðrenn og aftan á skurðviðgerðina. Royking er vandamikil og ger mótstøðuførið í kroppinum veikari og ávirkar virksemið í æðrunum. Fá tær ráð frá einum ráðgeva, sum kann hjálpa tær við at leggja av at roykja.

Áðrenn og aftan á skurðviðgerðina er tað umráðandi at eta føðsluríkan kost, t.d. proteinir, ið eru sera umráðandi til at uppbyggja vevnaða og til at væla um vevnaðan í kroppinum. Dømi um proteinríkar matvørur eru kjøt, fiskur, egg og mjólkarúrdráttir. Frukt og grønmeti, ið innihalda ríkiligt av vitaminum og miniralum, eru serliga týdningarmikið at eta áðrenn og aftan á skurviðgerðina. Tað stuðlar undir eitt heilsugevandi stoffskifti og er við at stuðla uppundir skjótari bata og hevur eisini góða ávirkan á grøðingina aftan á skurðviðgerðina. Í serligum førum verður neyðugt at taka vitaminískoyti, serstakliga, tá ein etur í minna lagi.

Er matarlystururin lítil, kann tað verða gott at eta ofta og í smærri nøgdum. Í serligum førum er tað neyðugt at drekka proteinríkar drykkir, ið kunnu keypast á apotekinum. Um veturin er neyðugt at taka lýsi/- lýsikapslar ella D- vitaminir.

### Vert at vita

Við innlegging á deildina skal tú hava lutir og tilfar til sjálvrøkt og klæði við tær, sum eru løtt at fara í og úr, t.d. venjingarklæði og góðar skógvar.

Tað ber til at nýta fartelefon. Hon skal tó vera ljóðleys og ikki verða øðrum til ampa.

Vitjanartíð er hvønn dag millum kl. 18:30 – 20:00. Er tørvur fyri tí, ber tað til at vitja sjúklingar aðrar tíðir, men skal hetta verða eftir avtalu við deildina.

Mælt verður til, at bert ein avvarðandi setir seg inn í støðuna hjá sjúkrarøktarfólkunum á deildini, og at viðkomandi síðan ber boðini víðari til hini avvarðandi.

## Fyrireiking til hjartaskurðviðgerð

Fyrireiking til skurðviðgerðina verður gjørd nakrar dagar áðrenn á innskrivingarmiðstøðini 10 E, sum húsast í kjallaranum á Landspítalið við Hringbraut. Tú skalt minnast til at hava heilivágin við, sum tú dagliga tekur.

Fyrireiking og vegleiðing er umráðandi undan skurviðgerð. Starvsfólkið á innskrivingarmiðstøðini fær neyðugar upplýsingar til at meta um heilsustøðuna og journalførir tær. Blóðroynd, landroynd, røntgenmynd av lungum og hjartarit verða tikin, og andadrátturin verður kannaður. Somuleiðis verða kanningar gjørdar um AIDS og livravirussjúku C og B. Skurðlæknin greiðir tær frá skurðviðgerðini, og hvat tú kann rokna við. Í samráð við teg ger narkosulæknin av, hvussu gjørt verður við narkosu/doyving. Ein fysioterapeutur kunnar og leiðbeinir teg við andingarvenjingum og fyribyrgjandi rørsluvenjingum. Umráðandi er, at ein av tínum avvarðandi er við til fyrireikingina til skurðviðgerðina.

Fyri at minka um vandan fyri bløðing í samband við skurðviðgerðina, er best at gevast við at taka heilivág, sum hevur "acetylsalicylsýru", sum magnyl o.l., sum er móti pínu, setir fepurin niður ella tynnir blóðið. Hetta verður gjørt í samráð við skurðlæknan.

## Skurðviðgjørda økið

Við hvørja skurðviðgerð er vandi fyri, at trupulleikar kunnu taka seg upp. Størstu vandarnir í hesum skurðviðgerðum er ígerð (smittuvandi) í skurðviðgjørda økinum. Tí er neyðugt kvøldið fyri skurðviðgerðina at fara tvær ferðir undir brúsu og vaska húðina væl við sóttreinsandi sápu, og so gera tað sama morgunin eftir skurðviðgerðardagin. Tú skalt eisini fara undir brúsu um morgunin sama dag, sum skurðviðgerðin verður framd.

Skurðviðgerðarøkið skal vaskast væl við sóttreinsandi sápu, og nalvin verða reinsaður. Neglalakk og andlitsmyrls skal fáast av, og deodorant, krem, oljur ella annað luktilsi má ikki verða smurt á húðina. Best er at lata skart og skreyt og annað virðismikið stás liggja eftir við hús. Við innlegging á deildina verða hárini á skurðviðgerðarøkinum rakað burtur.

## Føsta

At fasta er ein partur av fyrieiking til skurðviðgerð. Tí er umráðandi, at magasekkurin er tómur áðrenn skurðviðgerðina. Annars er vandi fyri at spýggja undir doyvingini.

Tú mást ikki eta fasta føði aftan á kl. 2 náttina áðrenn skurðviðgerðina. Klárir drykkir kunnu drekkast í smáum í upp til 2 tímar áðrenn skurðviðgerðina. Klárir drykkir eru luktleysir drykkir við ongum feitti og mjólk í, eitt nú vatn og klár fruktsaft (við ongum frukttrægrum), te og kaffi. Umráðandi er ikki at roykja ella brúka annað tubbak, tyggja tyggigummi ella at eta bomm seinastu tveir tímarnar undan skurðviðgerðini. Fyri at minka um árinini av at fasta, verður tað rátt til at eta lætta føði kvøldið fyri skurðviðgerðina.

## Onnur týðandi fyrireiking

Stutt áðrenn farið verður undir skurðviðgerðina, verður sissandi heilivágur givin. Aftan á, at sissandi heilivágur er givin, verða ráð givin um, hvussu hjálp kann fáast til at koma úr songini.

# Á sjúkrahúsinum

## Á skurðstovuni

Tú verður flutt/ur á skurðstovuna í song, og har tekur starvsfólkið á skurðdeildini ímóti tær. Tá skurðviðgerðin er liðug, ringir skurðlæknin til ein av tínum avvarðandi.

## Intensiv deild

Eftir skurðviðgerðina verður tú flutt/ur til intensivu deild, har ansað verður eftir, hvussu tú hevur tað aftan á skurðviðgerðina. Elektrodur verða settar á bringuna til yvirvaking av hjartanum. Ein sjúkrarøktarfrøðingur heldur eyga við blóðtrýsti, pulsi og andadrátti, og súrevni verður mátað. Undir skurðviðgerðini verður eitt landrør (katetur) lagt upp í bløðruna, sum verður tikið úr tveir til tríggjar dagar aftan á skurðviðgerðina ella í samráð við læknan. Hetta verður gjørt fyri at hava eftirlit við landúrskiljingina beint eftir skurð-viðgerðina og eisini til umlættingar hjá tær.

Undir skurðviðgerðini verða slangur førdar inn í bróstholuna til at flyta burtur blóð og vætu frá skurðviðgerðarøkinum. Vanligt er, at slangurnar verða tiknar úr dagin eftir ella annan dagin aftan á skurðviðgerðina.

Teir fyrstu tímarnir eftir skurðviðgerðina svevur tú í einum andingartóli (respirator), ið stýrir andadráttinum og fyri at fáa eitt nøktandi luftskifti. Andingartólið flytur súrevni niður í lunguni gjøgnum eina klæna slangu, sum liggur niður í barkan. Tá ið tú vaknar eftir skurðviðgerðina, er tað vanligt, at tú ikki kann tosa, tí tú framvegis liggur í andingartóli (respirator), men tú kanst samskifta við at gera tekin ella skrivað niður.

Í intensivu deild er ein sjúkrarøktarfrøðingur, sum alla tíðina hyggur eftir, hvussu tú hevur tað. Tá tú ert før/ur fyri at anda sjálv/ur, verður andingartólið tikið burtur. Tað er sera umráðandi, at tú kemur fyri teg so skjótt sum gjørligt eftir skurðviðgerðina. Longu aftan á, at andingartólið er tikið burtur, fært tú hjálp til at koma upp úr songini og eisini hjálp við at gera andingar-og rørsluvenjingar. Andingarvenjingar hjálpa til við at loysa slím úr lungunum, og rørsluvenjingar økja um blóðrenslið og minka um vandan fyri blóðtøppi.

## Vitjanartíðir

Eftir skurðviðgerðina kanst tú rokna við at liggja á intensivu deildini í ein til tveir dagar. Á intensivu deild eru ikki fastar vitjanartíðir, men tað ber til hjá tínum avvarðandi at vitja teg eftir avtalu við deildina.

## Hjartadeildin 12 E

Tá tú ert komin fyri teg eftir skurðviðgerðina, verður tú flutt/ur til eina hjartadeild. Teir fyrstu dagarnar er vanligt, at tú hevur eitt landrør (katetur), og tú fært súrevni gjøgnum nøsina, og væta verður givin í eina æðr. Møguliga hevur tú framvegis slangur í bróstholuni.

## Hjartað

Vanlig hjárin aftan á eina hjartaskurðviðgerð er óljóð á hjartasláttinum. Teir fyrstu dagarnar verða elektrodur settar á bringuna til yvirvaking av hjartanum. Skuldi óljóð av hjartanum gjørt vart við seg, ber tað til við heilivági at viðgera hendan trupulleikan. Blóðtrýst og pulsur verða mátað regluliga. Hetta verður gjørt hvønn dag, ið tú ert innløgd/innlagdur.

## Rørsla og hvíld

Tað er ikki óvanligt at kenna seg troyttan og at hava størri svøvntørv eftir skurðviðgerðina. Tú má minnast til, at hvíld er líka týdningarmikil sum rørsla. Í byrjanini er neyðugt, at sjúkrarøktarfólkið vegleiðir og hjálpir tær við rørslu og venjing. Teir fyrstu dagarnar skalt tú taka tær av løttum og ansa væl eftir bringubeininum. Tú brúkar rættiliga nógva orku við at sodna matin. Tí er umráðandi at hvíla í minsta lagi ein hálvan tíma undan hvørja máltíð. Tað tekur tíð at styrkna aftur. Best er at byrja í smáum og at røra seg regluliga hvønn dag. Sum frálíður, fært tú styrk og orku at røra teg aftur.

## Pína

Tað er einki óvanligt, at tú kann fáa stingir og pínu í og uttan um skurðviðgjørda økið og í skurðviðgjørda beinið, serliga í samband við rørslu-og andingarvenjingar teir fyrstu dagarnar aftaná. Til ber at brúka ein kodda sum stuðul við hosta-og andingarvenjingarnar. Tú fært pínuheilivág til at minka um pínuna og lætta um rørsluna. Pínuheilivágur verður givin eftir tørvi hjá hvørjum sjúklingi sær. Umráðandi er, at tú sigur sjúkrarøktarfrøðinginum frá, hvussu tú ert fyri, so at pínan kann verða viðgjørd so skjótt, sum tørvur er á tí.

Tá ið ætlað verður um pínu, verður tað mált eftir einum stiga, sum gongur frá 0 til 10.

0 er eingin pína og 10 er ringasta pína (ótolandi).

*Pínustigið VAS*

| 0 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eingin | | Lin | | Munaverd | | Ring | Nógv | | Ótolandi | |

Sig endiliga frá, um tú hevur pínu. Sig eisini, hvussu pínuheilivágurin, sum tú fært, virkar.

## Venjingar við andadráttinum

Størstu vandarnir við narkosu og seingjarlegu eru, at slím kann seta seg í lunguni, og at vandi kann verða fyri lungnabruna. Tí eru rørsluvenjingar og venjingar við andadráttinum sera týdningamiklar fyri at forða fyri møguligum hjáárinum. Andavenjingar hjálpa til við at loysa slím úr lungunum. Neyðugt er at gera andavenjingar regluliga hvønn tíman, meðan tú vakir. Fyrstu dagarnar aftan á skurðviðgerðina fært tú hjálp og vegleiðing við rørslu frá einum fysioterapeuti og frá starvsfólkinum á deildini.

## Vætumátingar

Í einari hjartaskurðviðgerð er tað vanligt, at rættiliga nógv væta setir seg í kroppin, og tí er tað ikki óvanligt, at tú tekur umleið 2-6 kg uppá aftan á skurðviðgerðina. Teir fyrstu dagarnar verður øll væta, sum drukkin verður, skrivað niður. Eisini verður niðurskrivað, hvussu stórar nøgdir av vatnið verða latnar. Hetta verður gjørt fyri at hava eftirlit við landúrskiljingi.

Viðhvørt verður vatndrívandi heilivágur givin fyri at minka um hetta.

## Opningur

Trekur/harður opningur kann koma eftir skurðviðgerðina. Tað kunnu verða ymsar orsøkir til trekan/harðan opning, eitt nú broytt svøvnlag, viðgerð við heilivági og, at tú drekkur ov lítið av vætu. Viðhvørt kann tað verða neyðugt at taka eina opningsmýkjandi loysn eftir skurðviðgerðina. Eru trupulleikar við trekum/hørðum opningi, er ráðiligt at fara regluliga á vesið og geva sær góðar stundir at tøma.

## Fótarøkt

Eftir skurðviðgerðina skalt tú fara í elastiskar sokkar. Hetta verður gjørt fyri at minka um trotið í skurðviðgjørda beininum. Mælt verður til ikki at liggja ella sita við krossløgdum beinum. Vaska tær dagliga um føturnar og turka tær væl. Brúka sokkar, ið ikki stramma og skógvar, ið ikki eru ov tættir.

## Svøvnur/hvíld

Svøvnlagið kann broytast teir fyrstu dagarnar eftir skurðviðgerðina. Orsøkin til tess kann verða pína, ótti, strongd og larmur av øllum tí virksemi, sum er rundanum teg. Umráðandi er at siga sjúkrarøktarfrøðinginum, hvussu tú ert fyri. Fyri at náa skjótari bata eftir skurðviðgerðina, er tað tørvur á góðum náttasvøvni.

## Kenslulig árin

Tað er ikki óvanligt at uppliva kenslulig sveiggj eftir skurðviðgerðina. Tú kanst kenna teg glaða/n, viðkvæma/n ella dapra/n alt í senn. Aftra teg ikki við at biðja um hjálpina, sum tær tørvar, og tosa um støðu tína og kenslur við starvsfólkið á deildini. Tað ber eisini altíð til at fáa viðtalu við ein sálarfrøðing ella við ein kirkjutænara, ið eru knýttir at deildini.

## Útskriving

Áðrenn tú verður útskrivað/ur, fáa tú og ein av tínum avvarðandi upplýsingar og vegleiðing viðvíkjandi heimferð. Ein sosialráðgevi kann leiðbeina tær um, hvussu tú kann útvega tær heimahjálp og greiðir tær frá rættindinum tínum.

## Upplýsingar áðrenn heimferð

Tað er ymiskt, hvussu viðgerðin ávirkar fólk. Tað er einki óvanligt, at ein er móð/ur ta fyrstu tíðina aftan á eina stóra skurðviðgerð. Tað hevur stóran týdning at vera jaligur um tilveruna og taka ein dag í senn. Tú kann bøta um heilsuna við av og á dagliga at hvíla. Rørsla er eisini ein sjálvsagdur lutur í at varðveita heilsuna. Sum frálíður, fært tú megi og orku at røra teg aftur. Fjølbroyttur og sunnur kostur kann eisini skunda undir skjótari bata.

Svøvnlag kann broytast teir fyrstu daganar eftir skurðviðgerðina. Orsøkin til tess kann verða ymisk, eitt nú pína og ótti. Um trupulleikin heldur fram eftir, at tú ert heimkomin, er neyðugt at tosa við kommunulæknan.

### Hjartað - hjartslátturin

Eftir eina hjartaskurðviðgerð er oftast tørvur á fyribyrgjandi heilivági, ið ávirka, at hjartað slær í takt. Tí er sera umráðandi, at tú regluliga kannar hjartasláttin hjá tær. Viðhvørt kanst tú verða varug/ur við, at ólag er í hjartslátturinum, eitt nú, at hjartað missir sløg, og at hjartað slær skjótari. Sterkt kaffi, vín, strongd, møði, stórar hitabroytingar ella sálarkvøl kunnu eisini ávirka hjartslátturin. Skuldi undannevndu eyðkenni gjørt vart við seg, og tey ikki hvørva aftan á nakrar minuttir, verður mælt til at fáa tær samband við læknan beinanvegin.

Ein eigur at sleppa sær undan stórum hitabroytingum, tí hjartað tolir ikki, at tað verður sera heitt ella sera kalt. Tað er eingin vandi at taka lunkað brúsubað, men mælt verður frá at taka sær eitt sera heitt brúsubað ella eitt sera kalt brúsubað tær fyrstu vikurnar eftir hjartaskurðviðgerðina.

### Hovin, møði og yvirvekt

Tað er ikki óvanligt at væta setir seg í kroppin aftan á eina hjartaskurðviðgerð ella aðrar hjartasjúkur. Tí er neyðugt, at tú dagliga vigar teg. Hevur tú tikið meira enn tvey kilo uppá um vikuna, ella um hendurnar, føturnar ella øklarnir er vorðin hovin, er tað væl møguligt, at væta hevur sett seg í kroppin.

Eitt av eyðkennunum fyri at væta hevur sett seg í kroppin er útlúgvan og bróstmøði. Tí er vandi fyri, at hjartað arbeiðir ikki, sum tað skal. Skuldi omannevndu eyðkenni gjørt vart við seg, er umráðandi beinanvegin at fáa samband við læknan

Tú skalt fara í lastiksokkar og vera í teimum um dagin. Hetta er gjørt fyri at minka um møguleikan fyri, at beinið verður hovið. Mælt verður frá at sita ella liggja við krossløgdum beinum.

### Skurðsár

Eftir, at tú ert útskrivað/ur er tað týdningarmikið, at tú fylgir væl við skurðsárinum. Eitt skurðsár tekur nakrar vikur at grógva saman. Tað er tí einki óvanligt, at tú kanst fáa stingir í skurðin ella, at hann er eymur. Økið uttanum skurðsárið kann gerast kensuleyst. Hetta

kemst av, at undir skurðviðgerðini verða ymsar smáar nervar í húðini kvettar av. Kensluloysi uttan um skurðviðgjørda økið kann vara í nakrar vikur eftir skurðviðgerðina. Verður tú varug/ur við, at skurðsárið verður reytt, eymari ella hitnar, og at tú fært hægri fepur enn 38°, kann orsøkin til tess verða smitta ella ígerð í tí skurðviðgjørda økinum. Um so, er neyðugt at venda sær til lækna ella sjúkrarøktarfrøðing á deildini. Fyrstu tvær tríggjar vikurnar eftir skurðviðgerðina er ikki ráðiligt at fara í baðikar, men tað ber væl til at fara undir brúsu, ella ikki fyri enn skurðsárið er væl afturgrógvið. Turka væl húðina tó uttan at gníggja. Verj skurðviðgjørda økið móti háfjallsól og sólbaði tað fyrsta árið.

### Pína og pínuheilivágur

Tað er natúrligt at fáa eitt sindur av pínu, men umráðandi er at taka pínuheilivág regluliga tær fyrstu vikurnar eftir skurðviðgerðina og síðan eftir tørvi. Hetta er fyri at minka um pínu og stingir og til at lætta um rørsluna.

### Harður opningur

Tú kanst fáa harðan opning eftir skurðviðgerðina. Umráðandi er tí at røra seg regluliga, eta regluliga, eta mat við trægrum í, frukt, grønmeti og breyð úr grovum mjøli. At fáa sær ein heitan munn niður undir morgunmat ella at drekka eitt glas av sviskusaft dagliga, kann eisini verða ein góð hjálp. Viðhvørt kann verða neyðugt at taka opningsmýkjandi loysing, sum fæst í apotekunum.

### Lyfta tungar lutir

Tað ganga umleið 3 mánaðar, áðrenn bringubeinið er væl afturgrógvið. Teir fyrstu dagarnar skalt tú taka tær av løttum og ikki leggja ov nógv fyri. Ansa væl eftir bringubeininum, akslunum og ørmunum. Mælt verður frá at lyfta tunga lutir, sum viga meira enn 5-10 kilo..

### At koyra bil

Ráðiligt er ikki sjálv/ur at koyra bil fyrstu 6 vikurnar eftir skurðviðgerðina, men tú kanst verða ferðandi í bili. Hugsandi er, at heilivágurin, ið tú tekur eftir skurðviðgerðina kann ávirka koyriførleikan. Um skurðviðgjørda økið er enn eymt, ber tað til at leggja sær eina lítla pútu undir bilbeltið ella yvir skurðviðgjørda økið.

### Kynslív

Tú kanst byrja samlív aftur eftir førimuni. Fyrstu tíðina eftir hjartaskurðviðgerðina er orkan til kynslív ofta ikki so stór. Harafturímóti kunna sálarlig og kropslig árin ávirka kynslívið. Vandaeyðkennini, eitt nú strongd, møði, ótti, pína og sálarkvøl, kunnu eisini ávirka samveruna. Sum frálíður fært tú styrki og orku at byrja samlív aftur.

### Lívsháttur

Flestu vandaeyðkennini fyri hjarta-og æðrasjúkur eru ættarbregði, royking, høgt kolesterol, høgt blóðtrýst, yvirvekt og kropsligt óvirkni. Tað er einki óvanligt at fáa sær ein nýggjan lívsstíl

eftir hjartaskurðviðgerðina. At røra seg regluliga, eta føðsluríkan kost, hava rætta likamsvekt og at lata vera við at roykja. Hetta styrkir hjartað og stuðlar undir vælveruna.

Sí meira á heimasíðuni hjá Hjartafelagnum www.hjartafelag.fo

**Til seinast**

Áðrenn tú verður útskrivað/-ur, fært tú tíð til eftirkanning hjá hjartalæknanum. Tað hevur stóran týdning, at tú kemur í gongd við venjing og rørslu beinanvegin eftir skurðviðgerðina. Tað er umráðandi at fara væl við sær sjálvum. Tú kanst bøta um heilsuna við at hvíla av og á. Hvíld og rørsla er ein sjálvsagdur lutur í at varðveita heilsuna. Eru spurningar, ella er okkurt ógreitt, ivast so ikki at seta teg í samband við starvsfólk á gongudeildini, sum altíð er til reiðar at ráðgeva um møgulig ivamál.

Við ynskjum um skjótan og góðan bata.

Starvsfólkið á hjartadeildini.

## Til minnis

SKURÐ DEPIL

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

ÚTGEFANDI:
LANDSPÍTALI, SKURÐ DEPIL
JANÚAR 2013

ÁBYRGÐARMAÐUR:
?

ÞÝÐING:
MAJBRITT VESTERGAARD

HÖNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC